# Gentu- bardagi í Havn



*Mánamorgunin varð ein 16 ára gomul genta dømd fyri at hava bankað eina unga gentu*

*Savnsmynd*

**16 ára gomul genta funnin sek í at banka unga gentu**

HARÐSKAPUR

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi, at ungar gentur vera dømdar fyri harðskap. Men mánamorgunin varð ein 16 ára gomul genta dømd fyri, tvær ferðir, at hava bankað eina aðra unga gentu í býnum í Havn í desember 2005. Genturnar, sum báðar eru úr somu bygd, høvdu eisini verið í herðatoppinum á hvørjari aðrari, og øðrum gentum, á Ólavssøku, og nú skuldi tað hevnast.

Ákærda gentan viðgekk, at hon fyrst hevði møtt hinari gentuni uttanfyri náttarklubban Cleopatra og har hevði hon lagt á hana – sparkað og sligið við nevum í andlitið, til onkur legði uppí og skilti tær sundur. Áleið ein tíma seinni møttust tær aftur aðrastaðni í býnum, og enn einaferð legði ákærda á hina gentuna. Hesaferð varð offurið sligið við nevum, sparkað og roytt, somikið álvarsliga, at hon fór á sjúkrahúsið, har lækanarnir eitt nú tóku myndir av henni. At andlitið var hovið, eyga var blátt, tannkjøtið meisla og skeinir á holdinum, prógvaði, at hon hevði verið fyri hørðum harðskapi.

16 ára gamla gentan játtaði seg seka, og varð dømd treytaðan dóm við eini royndartíð á tvey ár. Sostatt skal unga gentan halda seg í skinninum í tvey ár. Um lága dómin, segði dómarin, Jonas Tei, at atlit vórðu tikin til lága aldurin á gentuni, og at hon ikki var dømd áður.

# Betrað tænasta í Suðuroynni

HEIMARØKT

*tíðindaskriv*

Sum ein liður útbyggingini av Heimarøktini fer økisterapi og náttarvakt nú at virka í Suðuroynni. Við hesum tænastum verður Suðuroyggin nú væl útbygd við heimarøktartænastum. Tað er Heimarøktin og Serforsorgin sera fegin um at kunna bjóða brúkarunum í Suðuroynni, sum er eitt av teimum økjunum í landinum, sum ikki hevur verið so væl fyri viðvíkjandi tænastum.

Økisterapiin er ein tænasta, har borgarin fær hjálp til at halda sín kropsliga førleika viðlíka og hjálp til at gera tað lættari at klára seg sum longst við sínum førleikum í egnum heimi.

Økisterpiin í Suðuroy byrjar 1. februar 2006. Økisterapiin virkar frammanundan í Suðurstreymoy og Sandoynni.

Skipanin við náttarvakt verður fyri fyrst ein royndarskipan, har Heimarøktin í Suðuroy fer at skipa eina koyriskipan við koyrandi náttarvakt fyri alla oynna.

Royndarskipanin, kemur væntandi í gongd 1. mai 2006. Tá árið er av, verður skipanin eftirmett, og støða verður tá tikin til, um hon skal halda áfram. Royndirnar í Suðuroy skulu eisini verða grundarlag fyri eini avgerð um, hvussu skal farast víðari við at bjóða somu tænastu í øðrum økjum í landinum.

Frammanundan er náttarvaktsskipan í Heimarøktini í Eysturoynni. Skipanin í Eysturoynni hevur virkað í gott tvey ár og er skipað við tilkallivakt.

Tá skipanin verður sett í verk, kunnu brúkararnir fáa samband við Heimarøktina alt samdøgrið, og við bráðfeingistørv fer náttarvaktin á heimavitjan. Hetta fer at geva brúkararunum eina størri trygd, serliga teimum sum búgva einsamøll.

# Toto leggur Føroyar fyri sínar føtur

Amerikanski rokkbólkurin Toto eigur mest seldu fløguna í Føroya størsta fløguhandli 3'aranum seinastu vikuna. Bólkurin skumpar sostatt Poppkorn, ið hevur átt ovastu rókina í fleiri vikur, niður á annað pláss.

Annars er listin sermerktur á tann hátt, at tvær fløgur, ið ikki hava verið á listanum í eina tíð Poetry & Aeroplanes hjá Teituri Lassen og Til Børnini Hjá Børninum hjá Anniku Hoydal eru komnar inn aftur. Serliga er tað løgið, at fløgan hjá Teituri liggur á 6. plássi fleiri ár eftir, at hon kom út.

-nud

